TILTØK

Meinigheitin í Hoyvík
Hósdagin kl. 18-19 venur Salti í Hoyvíkar skúla, kl. 20 ungdómsmøti hjá Mourits og Guðrun, Onnugøta 7. Øll eru vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Mikudagin kl. 15 bøn, kl. 19.30 sangløta. Hósdagin kl. 20 heimaforbundið, majorarnir Ada Cecilie og Thorbjørn Vang.
Pálmasunnudag kl. 11 møti, major Tjåland, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Palla Petersen.

KFUM og KFUK í Havn
Mikudagin 4. kl. 19.00 í KFUM: TenSing kórið venur. Ung frá 13 ár eru vælkomin við. Kl. 21 í KFUM: Hugnaløta við turrum fiski og spiki eftir føstugudstænastuna.
4. grein skótar: Vit hittast mikukvøldið í KFUK eftir gudstænastuna.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 evangeliskt møti.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið í Havn
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Alfred Olsen.
Fríggjakvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Andrass Arge, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.
Meinigheitslegan verður í Nesvík 20.-22. apríl. Tilmelding fer fram við at ringja á tlf. 220797, á tlf. 220989 ella í húsinum innan 16. apríl. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ebenezer
Mikudagin kl. 20 uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin:
Morgunmøti kl. 11,
kl. 12.15 sunnudagsskúli,
kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 19 ungdómsrally, kl. 21 bøn fyri býnum, í annaðkvøld kl. 19 Teen Xtreme.
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 9.30-14 temadagur, evni: Profeta orð v/ luttøku av fólki, sum vóru á stevnu í Noregi, tilm. við kunningardiskin hjá Filadelfia ella tlf. 314828, kostnaður 50,- kr.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 møti.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Øll møti eru fyribils avlýst vegna umvæling.

Føstugudstænastur
Havnar kirkja: mikukvøldið kl. 20 Marjun Bæk.
Argja kirkja: hóskvøldið kl. 20 Torleif Johannesen.
Gjógv: kl. 19,
Funningur: kl. 20.30 Hans J. Joensen, biskupur.
Norðskála: kl. 18,
Eiði: kl. 20.30 Emil Olsen.
Klaksvík: kl. 20 Hans Eiler Hammer, kirkjukaffi aftaná í kirkjukjallaranum.
Norðoya vistarheim: kl. 19.30 Elsa Funding.

Filadelfia, Sundalagið
Í kvøld kl. 17.30-19.30 Miðdepilin – títt kvøld, tónleikur, spøl, ítriv og matgerð.
Í morgin kl. 16-17.30 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn, kl. 18-19 bønarmøti.

Páskastevnan 2001
verður í ítróttarhøllini á Skála. Byrjað verður skírískvøld kl. 18. Sí annars lýsing á www.keldan.fo

Soli Deo Gloria
Mánakvøldið kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli, kl. 16.30: Alpha skeið (11-15 ár), kl. 18: Møti við Tummas Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Ónskvøldið kl. 20: Uppbyggingarfundur.

Vitnið, Hvalba
Osvald Kjærbo talar á møtinum í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Kirkjan á Leiti
Missiónsvikan byrjar hóskvøldið kl. 20 við Malan Hentze og Ebbu Midjord. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Pensionistafelagið í Havn
Eftir páskir hittast vit aftur *mikudag*. Øll, M/K sum eru fylt 60 ár, eru vælkomin at gerast limir. Nevndin

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 2. apríl:
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-12.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin. Kortspæl, telving og onnur spøl.
Tilmelding til sjónleikin á tlf. 316491.
Týsdagin 3. apríl:
kl. 10.30-12.00 Látur uttan orð. Hava tygum hug at flenna? Vivian Guðmundsson
Kl. 15.30 Vitjan úr Fuglafirði
Mikudagin 4. apríl:
kl. 10.00-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00 Páskadøgurði Gjaldast áðrenn 70,-
kl. 14.30 Framsýning á Snarskivuni, Bárður Jákupsson
Hósdagin 29. mars:
kl. 10.30-11.00 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 11 Eitur nakað land Week-end? Jóanes Nielsen.
Tilm. mánadg. tlf. 316491
kl. 14-17 Telduprát á 1. hædd, Brandur Petersen
Fríggjadagin 6. apríl:
Opið hús.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Sporafundur verður í kvøld kl. 20–21.

Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

KRIS í Føroyum
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22.
Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adressu: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

Giktafelag Føroya
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin:
Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð:
Sára, tlf. 373106.
E-mail:
sara@post.olivant.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Møtiskrá hjá trúboðaranum Hera Elttør
Í Struer missiónskirkju 4. apríl kl. 19.30.
Øll hjartaliga vælkomin. Eisini vælkomin at ringja/skriva til trúboðaran um fleiri upplýsingar:
Heri Elttør
Sønderagervej 60
7460 Aulum
97473786

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
E-mail:
eliaskirkjan@get2net.dk
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (dansk tíð).

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03.
Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis.
Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Øldusløð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið.
Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.